## Kristian Fr. Olsen varaborgarstjóri



**Klaksvík:** Ein meiriluti í býráðnum samtykti á fundi í gjárkvøldið at velja Kristian Fr. Olsen (á talarastólinum) úr Fólkaflokkinum til 1. varaborgarstjóra galdandi fyri restina av inniverandi býráðsvalskeiði. Hetta kemur av, at Jákup Mikkelsen hevur sagt frá sær varaborgarstjórasessin, nú hann hevur tikið sæti á Føroya Løgtingi.

## 7000 pund eftir tveimum setum

**Sørvágur:** Landingarmiðstøðin í Sørvági tók í gjár ímóti 15000 pundum frá útróðrarbátum. Bátarnir eru úr Vágum, Skopun og Havn. Tann, sum hevði mest var báturin Anna J úr Skopun. Teir høvdu 7000 pund av tveimum setum, skrivar heimasíðan www.joanisnielsen.fo

# Fleiri vilja byggja á Viðareiði



*- Umsóknirnar koma sum oftast frá fólki, har annar parturin er hiðani, sigur borgarstjórin á Viðareiði, Hans J. Kallsberg*

*savnsmynd*

**Hóast bygdin liggur avsíðis og heldur langt burturi frá meginøkinum, er kortini líkt til at fólk fegin vilja búseta seg her**

BYGDAMENNING
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Viðareiði:** Í dag búgva 352 fólk í Viðareiðis kommunu. Men líkt er til at tey gerast enn fleiri í næstum.

Á skrivstovuni í bygdarráðnum liggja tey inni við fleiri umsóknum frá fólki, ið er hugað at búseta seg í hesi norðastu bygd okkara.

- Vit hava seks seriøsar umsóknir, staðfestir borgarstjórin, Hans J. Kallsberg yvirfyri Sosialinum.

Hetta hendir, hóast henda bygdin liggur fjarskotin, og hóast neyðugt er at koyra eftir bæði smølum og ótíðarhóskandi vegi um bygdarfólkið skal nakrastaðni við bili.

Helst er tað vakra náttúran og barnavinarliga umhvørvið, sum gera sítt til, at fólk senda inn umsóknir til grundøki.

### Flyta inn

Hóast fólk eru spent eftir at fáa grundøkið fyri at byggja sær síni egnu hús, so er kortini neyðugt hjá teimum at geva tol.

- Eg sigi bara sum Heðin (Mortensen, blðm.), at tað tekur tíð at avgreiða øll hesi málini – eisini í okkara kommunu, sigur Hans J. Kallsberg.

Meðan bíðað verður, kann bygdarfólkið fegnast um, at hús standa í gerð og at fólk eru í ferð við at flyta inn í tvinnandi hús í bygdini.

Spurdur um, hví fólk velja at búseta seg í heimbygd hansara, sigur hann at oftast er talan um, at annar parturin er ættaður haðani.

- Hinvegin eru ikki nógvar umsóknir frá fólki, har hvørgin teirra er ættaður av Viðareiði, sigur borgarstjórin.

### Trivnaður

Fólkatalið á Viðareiði hevur verið støðugt vaksandi seinastu 20 árini.

Í 1985 búðu 275 fólk í bygdini og fýra ár seinni fór talið upp um 300, vísa hagtøl frá Hagstovuni.

Hesi seinnu árini hevur talið ligið rættiliga støðugt millum 340 og 350, og var um ársskiftið tað hægsta nakrantíð – 352.

Í bygdini finst millum annað skúli, spælistova til dagrøktina og í næstu letur eisini ein handil uppaftur, eftir at bygdin hevur ligið í handilsloysi í eina tíð.

Samstundis við hetta verður í løtuni kannað, um og hvussu ein tunnil skal gerast millum Hvannasund og Viðareiði. Ymiskar loysnir hava verið viðgjørdar, millum annað ein tunnil uppá 2300 metrar.

Roynt verður í øllum førum at skapa umstøður, soleiðis at fólk kann trívast á Viðareiði.

# Nýtt uppskot um nýggjan tunnil

**Norðoyatingmenninir, Anfinn Kallsberg, Jákup Mikkelsen og Bjørn Kalsø hava lagt uppskot um at gera tunlar millum Klaksvík, Árnafjørð og Depil. Hetta er at kalla sama uppskot sum varð lagt fram í seinastu tingsetu, men fall burtur tá val varð útskrivað**

SAMBAND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Eitt modell av teimum støðunum, har ein kann hugsa sær at ein komandi tunnil á Borðoynni kemur at liggja. Møguleikar eru at gera ein einstakan tunnil av Strond til Depils (1), ella tveir, har ein knýtir Árnafjørð uppí (2)*
*Mynd: landsverk.fo*

**Borðoy:** - Nógv ferðsluóhapp hava verið á hesi farleiðini – bæði til tunlarnar, millum tunlarnar og í sjálvum tunlunum, vísa teir tríggir andstøðutingmenninir á.

Í uppskotinum mæla teir til at gera tveir tunlar – ein millum Klaksvík og Árnafjørð, og ein millum Árnafjørð og Depil.

- Útreiðslurnar til hetta skulu í mesta lagi verða 292 mió krónur, siga teir tríggir.

Skotið verður upp at játta 26 mió til ætlanina í ár, og síðani størri upphæddir tey næstu fimm árini, fram til 2012.

Verkætlanin er kostnaðarmikil, viðganga tingmenninir. Hetta kemur av, at talan er um at gera tveir tunlar.

### Deyðsfella

Í viðmerkingunum til uppskotið verður víst á, at verandi farleið Norður um Fjall, frá Klaksvík og yvir til Árnafjarðar og víðari norður til Norðdepils, varð tikin í nýtslu, tá tunlarnir á Borðoynni vórðu latnir upp í ávikavist 1967 og 1969.

Tunlarnir hava bara eina koyribreyt og lúka tí ikki nútíðar krøv til hædd, breidd og trygdarútgerð. Fríhæddin er 3,2 m og breiddin 3,5 m, og tí kunnu størri akfør ikki koyra ígjøgnum tunlarnar, sum eru álvarsligir fløskuhálsar fyri bygdirnar norðanfyri.

Í báðum tunlunum er bara ein koyribreyt, og skal suðurgangandi ferðsla halda aftur fyri mótkoyrandi ferðslu. Hetta skapar ruðuleika, tá akfør, sum ganga í gjøgnum tunlarnar, men ikki sleppa inn á víkiplássini møtast, ella tá fleiri bilar samanhangandi skulu víkja á sama víkiplássi fyri mótkoyrandi ferðslu.

- Tí er verandi støða ein deyðsfella, har eingi trygdarkrøv yvirhøvur eru ásett og enn minni uppfylt, vísa teir tríggir á.

Tað búgva umleið 800 fólk norðan fyri tunlarnar, og ferðslan er stór, umleið 900 akfør koyra í miðal um samdøgrið, men til og frá arbeiði er ferðslan ikki minni enn í Norðoyatunlinum.

Uppskotið fer eisini at fáa positivar avleiðingar fyri vinnuna. Sum er, kann eingin av størru bussunum og einki nútímans flutningsakfar nýta verandi farleið.

- Fyri ferðavinnuna eru hesir tunlarnir eisini ein avgerandi fortreyt, verður sagt.

Uppskot nr. 134/2007 er nú lagt fram, og nú verður bíðað eftir, hvat tingið sigur til tað.